# Flott ársúrslit og framgongd í 2007

Úrslitið fyri 2007 er besta ársúrslitið í 64-ára longu søguni hjá Suðuroyar Sparikassa.

Ársúrslitið fyri 2007 er 4.045 t. kr. Hetta er 148% betri enn í 2006, og 52% betri enn besta ársúrslit higartil hjá sparikassanum í 2002.

Eginpeningurin við árbyrjan er forrentaður 9,6% eftir skatt, móti 4,0% árið fyri.

Framgongdin stavar frá øktum nettorentuinntøkum, fleiri ómaksgjøldum, afturflytingum og færri útreiðslum, og samstundis einum stórum innsatsi fyri sjálvvirkandi tænastum og effektiviseringum.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar hækkaðu við 2.385 t.kr.úr 17.477 t.kr. til 19.862 t. kr. í 2007. Hetta er ein øking uppá 14 %.

Sparikassin staðfesti í 2007 eitt kurstap á 409 t. kr. í mun til ein kursvinning á 545 t. kr. í 2006.

Í 2007 eru tap og burturleggingar -716 t.kr. í mun til -143 t.kr í 2006. Sparikassin avskrivaði 734 t.kr. uppá fastar ognir, maskinur og innbúgv í 2007 í mun til 656 t.kr. í 2006.

Samlaði skatturin fyri 2007 er 448 t.kr.

Útreiðslurnar til starvsfólk og umsiting lækkaðu við 305 t.kr. úr 15.621 t.kr. til 15.316 t.kr. Hetta er ein minking uppá 2 %.

Javnin er øktur til 464 mió. kr. – frá 403 mió. kr. Hetta svarar til ein vøkstur á 15%.

Størsti parturin av vøksturinum stavar frá øktum innlánum. Innlánini eru økt við 19% - frá 347,5 mió. kr. til 414,6 mió. kr.

Samanborið eru útlánini økt við 8% - frá 366,8 mió. kr. til 394,4 mió. kr.

Sparikassin valdi í 2007 at tálma vøksturin á útlánum, bæði út frá eini meting um at búskapargongdin er um at venda, men eisini við atliti at gjaldførinum, soleiðis at sparikassin stendur væl hóast møgulig árin frá órógvini á altjóða fíggjarmarknaðaunum .

Suðuroyar Sparikassi setti sær tí í 2007 sum mál at fáa útlánsprosentið undir 100. Í 2007 er útlánsprosentið soleiðisi 96, afturímóti 107 í 2006.

Eginkapitalurin ultimo 2007 er 44 mió. kr. eftir at 2 mió. kr. eftir uppskoti frá nevndini verða útgoldnar sum vinningsbýti til partaeigarnar.

Solvensurin ultimo 2007 var 14,4% í mun til lógarkravið á 8,0%.

Umroknað til heildarsstørv arbeiddu 16 fólk í Sparikassanum í 2007. Í 2006 arbeiddu 15 fólk.

Suðuroyar Sparikassa væntar eitt óbroytt úrslit fyri 2008 í mun til ársúrslitið 2007.

# Rakstrarroknskapur

| 1.000 kr. | 2007 | 2006 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur | 26.075 | 19.042 |
| Rentuútreiðslur | 10.185 | 5.451 |
| **Netto rentuinntøkur** | **15.890** | **13.590** |
| Vinningsbýti av partabrøvum | 57 | 198 |
| Kostnaður og provisjónsinntøkur | 3.915 | 3.688 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **19.862** | **17.477** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | -409 | 545 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 373 | 302 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **19.826** | **18.324** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 15.316 | 15.621 |
| Av- og niðurskrivningar av ítøkiligum ognum | 734 | 656 |
| Tap og burturleggingar (afturføring) | -716 | -143 |
| Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 0 | 21 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **4.492** | **2.211** |
| Aðrar óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| Aðrar óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **4.492** | **2.211** |
| Skattur | -448 | -582 |
| **Ársúrslit** | **4.045** | **1.630** |

**Býtið av ágóða**

| | | |
|---|---|---|
| Ársúrslit | 4.045 | 1.630 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 1.630 | 0 |
| **Tøkur peningur tilsamans** | **5.675** | **1.630** |
| Nýtt til vinningsbýti | 2.000 | 0 |
| At flyta til næsta ár | 3.675 | 1.630 |
| **Nýtsla av tøkum peningi** | **5.675** | **1.630** |

# Fíggjarstøða pr. 31. desember 2007

| 1.000 kr. | 2007 | 2006 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 12.660 | 11.219 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 30.391 | 4.510 |
| Útlán | 394.422 | 366.819 |
| Lánsbrøv | 12.392 | 8.617 |
| Partabrøv | 4.383 | 3.567 |
| Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 1.729 | 1.729 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 0 | 0 |
| Ítøkiligar ognir | 5.869 | 5.570 |
| Aðrar ognir | 2.048 | 478 |
| Tíðaravmarkingar | 260 | 306 |
| **Ognir tilsamans** | **464.155** | **402.814** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til fíggjarstovnar og tjóðbankar | 1.095 | 10.559 |
| Innlán | 414.547 | 347.523 |
| Onnur skuld | 3.601 | 1.816 |
| Avsetingar til skyldur | 768 | 799 |
| **Eginogn** | | |
| Partapeningur | 39.988 | 39.988 |
| Ábyrgdarpeningur | 471 | 499 |
| Yvirkursur í samband við partabrævútgávu | 10 | 0 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 1.630 | 0 |
| Flutt avlop | 2.045 | 1.630 |
| Eginogn tilsamans | 44.144 | 42.117 |
| **Skuld tilsamans** | **464.155** | **402.814** |
| **Tøl, sum ikki eru við í fíggjarstøðu** | | |
| Ábyrgdir o.a. | 4.541 | 2.411 |